gult cyan magenta svart



## Viðmerking:

# Andstøðan stríðist

Tað eru nógvar greinar skrivaðar í bløðunum um, hvussu tað stendur til á Føroya Løgtingi, tað fyrsta ein hugsar um er at har sita fólk, sum royna at spilla hvønnannan út og brigsla hvørjum øðrum eitt og annað, ein kann ikki lata vera við at halda, at har blíva privat mál og øvund blandað upp í og gloyma hvat teir eru valdir til.

Tað sær út fyri meiniga manninum, at andstøðan á tingi situr bara og mótarbeiðir og spillir fyri samgonguna.

Eitt tað grovasta dømið er hvussu Helena Dam á Neystabø verður illa viðfarin av undanfarna løgmanni og Kristiani Magnussen, sum í undanfarnu samgongu var landsstýrismaður í almannamálum.

Seinasta samgonga við Edmundi Joensen sum førara var sera óheppin innan almannaøkið. Sum øllum kunnugt so byrjaði samgongan við at Javnaðarflokkurin hevði almannamál og fíggjarmál um hendi, til frama fyri Kristian Magnussen, sum nú bleiv orðførari hjá Javnaðarflokkinum í almannamálum.

Tá so tann orðamikli, brasni Kristian Magnussen slapp fram at fatinum, fingu pensionistarnir mót aftur, men gakk, hann endaði í somu grøvini. Tá ið skeiðið var hálvt, fór Javnaðarflokkurin úr samgonguni (slepti endanum).

Eftir eitt langt áramál við ongari prísregulering, har myrkrið hevði valdað, kom Helena Dam á Neystabø. Hon fekk broytt ta peningaligu upphæddina til almannamál munandi á løgtingsins fíggjarlóg til frama fyri tey gomlu og veiku í samfelagnum.

Tað kann væl vera, at onkur pensionistur, sum hevur onkrar aðrar inntøkur, hevði væntað sær meira, men fjøldin hevur fingið og fer at fáa eina munandi bata.

Tað eru tveir, sum leika mest í, teir vilja hava Helenu Dam á Neystabø frá. Tað sær út sum fyrrverandi løgmaður er at læra Kristian Magnussen at koyra landsstýrismenn frá, men eg rokni ikki við, at hann kemur at hava brúk fyri tí.

Míni ráð eru: latið Helenu Dam á Neystabø hava frið at fáa pensiónirnar í rætt lag, hon er til reiðar at rætta tað, sum kanska ikki er heilt rætt, tað er ikki bara sum at siga tað at fáa eina nýggja pensiónslóg at rigga sum hon eigur.

Um hon verður koyrd frá, sum eg vóni ikki, so kenni eg ikki enn nakran, sum kann setast í hennara sess til frama fyri pensionistarnar.

**Formaður fyri Landsfelag Pensionistanna**
**Tómas Tómasson**

# Tryggleikin á gamalsaldri

*– Eg ynski, at viðurskiftini hjá okkara pensjonistum, bæði sjálvar pensjónirnar, heimarøktin og øll onnur viðurskifti, koma í eina trygga legu, soleiðis at brúkararnir kenna seg væl, kenna seg at hava týdning, kenna seg at verða partur av samfelagnum, kenna seg at hava eina ábyrgd, segði Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins m. a. tá Eldradagar vóru í Skopun 8. juli*

*Eldradagur í Skopun 8. juli 2000 - seinni partur (fyrri partur var prentaður í blaðnum mikudagin)*

**Góðu pensjonistar**

**Samhaldsfasti**

Vit í Javnaðarflokkinum hava nú í nógv ár mælt til, at vit í staðin styrkja og útbyggja okkara samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunn. Saman við øðrum flokkum hevur tað eydnast at fáa hesa skipan at virka, tó við sera smáum seglum. Inngjaldið í dag er _%, og útgjaldið er góðar 500 kr. um mánaðin.

Skipanin er, at øll gjalda eitt ávíst prosent av lønini, og at arbeiðsgevarar gjalda sama prosentið av øllum útgoldnum lønum. Øll eiga rættin til eitt og sama útgjald uttan mun til, hvussu nógv ein sjálvur hevur goldið inn og uttan mun til hvønn leiklut, ein hevur havt á arbeiðsmarknaðinum. T.v.s. at eisini tey, sum als ikki hava verið á arbeiðsmarknaðinum fáa sama útgjald. Her er sostatt talan um veruligan solidaritet, har teir sterkaru herðarnar bera meira, men øll fáa eins út. Og av týdningi er, at arbeiðsgevararnir eru við til at fíggja hesa skipan.

Skuldi so onkur havt hug til at tryggja seg uppaftur betur, so stendur tað einum og hvørjum frítt at tekna eina trygging umframt.

Um politiskur meiriluti fæst fyri einari veruligari útbygging og styrking av samhaldsfasta arbeiðsmarknaðareftirlønargrunninum, og inngjaldið stigvíst verður hækkað upp til 5% frá arbeiðsgevara og 5% frá lønmóttakara, so vil útgjaldið aftaná 5 ár verða komið upp á góðar 6.000 kr. til hvønn um mánaðin og aftaná 12 ár upp á 8.500 kr. til hvønn pensionistin um mánaðin.

V. ø. o. fáa vit politiska undirtøku t.d. í einari nýggjari samgongu fyri hesi útbygging, so vil ein stakur pensionistur í Føroyum í ár 2012 fáa góðar 14.000 kr. um mánaðin við samhaldsfasta og vanligu fólkapensjónini, meðan eini hjún, har bæði eru pensjonistar, fáa smáar 13.000 kr. hvør ella smáar 26.000 kr. tilsamans um mánaðin. Og rentutilskrivingin hjá grunninum fer at gera, at útgjaldið við sama inngjaldi hækkar javnt.

Hetta er veruliga ein loysn, sum fyri tað fyrsta hevði steðgað kjakinum um pensjónir einaferð med alla, og fyri tað næsta so kann eingin pensjónsbumba hótta ein slíkan grunn. Men fyrst og fremst tryggjar hon øllum pensjonistum eina góða og rímiliga pensjón.

**Heimarøktin (tænasta/ umsorgan)**

Sum ein beinleiðis fylgja av, at kvinnurnar í stórum tali fóru út á arbeiðsmarknaðin í 60 og 70 árunum, var knappliga eingin, sum kundi hava umsorgan fyri teimum gomlu, har henda var neyðug. Vit fingu tí almennu skipanina við heimahjálp, sum síðan er broytt til heimarøkt.

Uttan iva virkaði henda skipan sera væl tey mongu fyrstu árini, har heimahjálpin hevði stundir til at taka sær av praktiskum eins væl og av sosialum uppgávum. Men tað er tó mangt, sum bendur á, at vit so líðandi hava fingið eina meira avmálda og kontanta skipan. Nú renna øll um kapp við tíðina. Vit hava ikki longur tíð at koma brúkarunum við.

Eisini henda gongd er eitt úrslit av nýggju tíðini, har alt skal vera so avmált og útroknað, at menniskjansligu virðini stórt sæð ikki verða tikin við.

Øll kenna vit hetta við ”cost-benefit”, har helst einki skal gerast uttan so, at vit hava eitt avkast av tí, ið gjørt verður. Og í kjalarvørrinum kemur so eisini ynski um, at vit í størst møguligan mun skulu privatisera alt tað, sum kann privatiserast. Og í londum rundan um okkum eitt nú í Danmark, har hevur man enntá privatiserað heimarøktina.

Ein privatisering av eitt nú heimarøktini hevur eittans mál fyri tann, sum átekur sær uppgávuna, og tað er, at viðkomandi fær eitt so stórt fíggjarligt avkast, sum gjørligt. Hetta kemur so til sjóndar í, at hvør minuttur er so neyvt avmáldur, at brúkarin fullkomiliga kennnir seg uttanfyri. Har verður alt gjørt eftir í service-management leistinum, t.v.s. tænastu- leiðslu leistinum , meðan umsorganin og aktiveringin eru burturgloymd. Brúkarin verður eín passivur eygleiðari av tí, sum fer fram í hansara egnu húsum.

Alt hetta verður gjørt í vónini um, at tað almenna ikki skal brúka óneyðuga nógvan pening til heimarøktina. Service-management mentanin byggir á tað sama, sum tá tú fært eitt tilboð upp á eitt arbeiði. Stoyping so og so nógvar tímar fyri so og so nógvar krónur, timburarbeiði so og so nógvar tímar fyri so og so nógvar krónur o. s. fr.

T. v. s. dustsúgving so og nógvar minuttir, sum kosta skipanini so og so nógvar krónur, rudding so og so nógvar minuttir fyri so og so nógvar krónur o.s. fr. Tað merkir, at menniskjansliga aspektið er púra burtur. Síðan ger man eina eftirmeting av skipanini, har eitt nú kannað verður eftir, hvussu nógvar ressoursir, brúktir eru. Svarið er: so og so nógvar minuttir ella tímar. Síðan verður ein kanning gjørd av kvalitetinum av arbeiðinum. Brúkarin verður spurdur, um dustsúgvingin er nøktandi, ruddingin er nøktandi o.s.v., men hann verður ikki spurdur, hvussu hann kundi hugsað sær, at tíðin eisini kundi verið brúkt.

Men tíbetur eru tað mong, sum í dag vilja vera við, at henda gongdin við eitt nú service-management innan heimarøktini fer at gerast óneyðuga dýr, sum tíðin gongur. Og harumframt fær ein møgulig privatiseringsætlan av heimarøktini her í Føroyum at møta stórari mótstøðu.

Og dýrkanin av skipanini stendst av, at man ikki í nóg stóran mun ger brúk av teimum evnum og førleikum, sum brúkarin hevur. Brúkarin verður settur í eina avlopsstøðu, sum er tann ringasta, tú kanst koma í.

Hví so ikki heldur stegða eitt sindur á - taka nakað av tí gamla, sum upprunaliga var og møguliga enn er í heimahjálpini við? Hví ikki gera brúk av tí orku og teimum førleikum, sum brúkarin hevur, sjávlt um tað krevur meira av bæði starvsfólkum og leiðslu?

**Tí hóast eingin kann alt, so kunnu øll okkurt**

Sjálvandi er talan um, at eitt ávíst praktiskt arbeiði skal gerast, men tann sosiali ella umsorgarparturin má ikki gloymast. Tey gomlu eru ikki passivir og sløktir brúkarar, tí hóast ymisk til førleika, so kunnu tey flestu kenna seg væl, um tey eisini merkja, at tey ikki heilt eru til avlops.

Lat okkum tí geva hesi skipan ta neyðugu orkuna, sum kann gera, at hon veruliga verður ein umsorgarskipan, har brúkarin er miðdepilin.

**Tryggleikin á gamalsaldri**

Eg vil enda við at bera fram eitt ynski um, at viðurskiftini hjá okkara pensjonistum, bæði sjálvar pensjónirnar, heimarøktin og øll onnur viðurskifti, koma í eina trygga legu, soleiðis at brúkararnir kenna seg væl, kenna seg at hava týdning, kenna seg at verða partur av samfelagnum, kenna seg at hava eina ábyrgd.

Viðurskiftu, sum vit politikarar kenna okkum tryggar við — bæði sum teir, sum sita við ábyrgd og sum teir, sum um ikki so langa tíð verða pensjonistar.

**Takk fyri og framhaldandi góðan eldradag**
**Jóannes Eidesgaard**

## Minningarorð um
# Gudrid Jacobsen,
## Vágur
**f. 22/4-1940 d. 6/7-2000**

Hósdagurin 6/7-2000 gjørdist ein sorgardagur fyri okkum, tí tá andaðist mamma og vermamma okkara brádliga alt ov ung – einans seksti ár. Hon var, sum so mangan, komin til Havnar at vitja okkum, og vit gleddu okkum til at vera saman í nakrar dagar. Hon hevði glett seg fyri fyrstu ferð at koma at gista hjá okkum í okkara nýggja heimi. Tað vardi ongan av okkum, at hennara dagar vóru við at vera taldir, og at henda vitjanin hjá okkum í Havn skuldi fáa ein so bráðan enda.

Gudrid var í mangar mátar ein serstøk kvinna. Tá hon giftist og fekk børn, gavst hon at arbeiða úti, men setti ístaðin heimið í hásætið, og hetta arbeiði røkti hon til lítar. Hon legði alla orku í at taka sær av manni, børnum og tí húsliga arbeiðinum, og altíð setti hon seg sjálva í síðstu røð.

Tað er sjáldsamt at finna ein persón, sum altíð setir seg sjálvan lægst, og altíð tekur hini fram um seg sjálvan, men hetta gjørdi Gudrid. Altíð var hon vælnevnd og vælhýrd. Hon var sera arbeiðssom, og einastandandi væl lá fyri hjá henni til tað handaliga, eins og hon var sera kvik í øllum verki. Í Gudrid fann tú eina kvinnu, sum bæði var ein einastandandi mamma og samstundis var framúrskarandi til alt húsligt og handaligt arbeiði.

Hon var ein sera gudrøkin kvinna og hon royndi í øllum verki sínum at bera seg at, so sum Guds orð fyriskipar.

Tað harmaði hana mangan tey seinnu árini, at so langt var millum hana og hennara ommubørn, og hon gjørdi mangan túrin norður eftir at vitja síni børn og ommubørn, og hetta hóast henni illa dámdi at sigla. Í eygunum á hennara ommubørnum var hon nakað serligt, tí hon gjørdi so nógv fyri síni ommubørn, og hon hevði eitt nærum óavmarkað tol, og hon segði aldri ommubørnunum nei til at gera eitthvørt saman við teimum. Mong eru tey pløggini, ið Gudrid bant sínum ommubørnum.

Vit eru ómetaliga takksom fyri tað, mamma og vermamma okkara var fyri okkum, og vit liva í vónini um, at vit ein dag skulu síggjast aftur.

**Jóhan Martin og Elisabeth**

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**
**www.sosialurin.fo**



## Ítróttur

e-mail: jakup@sosialurin.fo
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

*Stórfavoritturin, Rógvi Johansen, vann sera tepurt í Klaksvík og var›veitur sostatt ta bláu troyggjuna*

myndir: Jens K. Vang

# Eitt sekund skilti teir

*Mikukvøldi› var prologur í Klaksvík í súkklukappingini Statoil Kring Føroyar, og Rógvi Johansen vann vi› einum sekundi frammanfyri Jens Tousgaard*

STEFAN Í SKORINI

Fyrstu styrkiroyndina vann stórfavoritturin Rógvi Johansen. Munurin var ikki serliga stórur ni›ur til næsta mannin, sum var danin Jens Tousgaard, i› ver›ur mettur at geva Rógva ta stinnastu mótstø›una. Ítróttarliga hev›i ta› tó veri› ein sensatión, um Rógvi ikki hev›i vunni›. Jens Tousgaard hevur veri› skaddur í fimm mána›ir, og tí er hann kanska ikki eins væl fyri, og hann kundi veri›.

Eitt sekund var á muni, tá i› avtorna›i. Rógvi koyrdi teinin í tí›ini 3 minuttir og 45 sekund og gjørdist eisini fyrsti vinnarin í hesi kappingini. Remy Lamhauge klára›i seg óvænta› væl. Hann byrja›i sum nummar 24, men enda›i á níggjunda plássi og brúkti 4 minuttir um teinin.

15 sekund skiltu teir fyrstu níggju súkklararnar, so munurin millum teir bestu var ikki stórur. Hetta kemst fyrst og fremst av, at teinurin var bara 2,7 kilometrar, og tá er onganstí› tann stóri munurin á súkklarunum.

Endamáli› vi› einum prologi, sum honum í Klaksvík, er at fáa eina hóming av styrkimuninum millum súkklararnar og at fáa avgjørt, hvør skal í bláu Statoil-troyggjuna, sum førarin koyrir í, á fyrstu veruligu etapuni, sum var í gjár.

### Team Shell væl fyri

Fimm av teimum seks skjótastu í gjár vóru Team Shell súkklarar. Hetta vísir, hvussu sterkt Shell li›i› er, og at lítil møguleiki er hjá hinum at gera seg galdandi.

Jens Glerup, sum er ein av fyrireikarunum, heldur, at hetta er sum at skjóta spurv vi› kanónunum.

- Shell li›i› er alt ov sterkt til at nakar annar hevur nakran møguleika. Hetta leggur eisini eitt tr‡st á Rógva sjálvan, sum skal vinna kappingina.

Eisini heldur Jens Glerup, at ta› er synd, at eitt so sterkt li› er stovna›, av tí at kappingin longu er avgjørd. Um Rógvi vinnur, so er hetta einki serligt vi› tí li›num, hann hevur aftanfyri seg.

Um Jens Tousgaard klárar at hanga vi› Team Shell, so hevur hann kanska ein lítlan møguleika, men fá halda, at hann kann hótta Rógva Johansen.

### Eingin fer›sla

Jens Glerup sigur eisini vegna fyrireikararnar, at kappingin eydna›ist sera væl. Ve›ri› var av tí besta, og tí vóru eisini nógv fólk og hugdu. Hornorkestri› spældi á málinum, og Statoil bjó›a›i fólki kaffi og anna› gott. Steinbjørn Jacobsen, varab‡rá›sforma›ur, handa›i trimum teimum fremstu blómur, og vinnarin fekk eisini ta bláu førara-troyggjuna.

Fyri fyrstu fer› høvdu fyrireikararnir fingi› loyvi frá b‡rá›num at steingja vegirnar, me›an kappingin fór fram. Fyrireikararnir høvdu sjálvir syrgt fyri vegbyrgingunum, og ein løgregluma›ur fylgdi vi› á vegnum, so at alt skuldi ganga rætt fyri seg. Hetta gjørdi, at súkklararnir kendu seg tryggari á vegnum. Fyrr hava trupulleikar veri› vi› fer›sluni í Klaksvík, tá i› súkklukappingar hava veri›.

Í gjár var so tann fyrsta veruliga etapan í Eysturoynni. Hetta er tann har›asta etapan, og hon er 106 kilometrar. Byrja› var› klokkan hálvgum tvey á Nor›skála, sí›ani var› fari› um Ei›isskar›, ígjøgnum Funningsfjør› um Gøtuei›i til Leirvíkar, aftur um Gøtuei›i og runt Agni›, sí›ani ver›ur koyrt runt í Runavík, og máli› er vi› Statoil stø›ina.

Í dag er einkultstartur í Sandoynni, har koyrdir ver›a 25 kilometrar. Teinurin er frá Statoil stø›ini á Sandi til Dals, aftur til Statoil stø›ina, sí›ani til Brúnna á Sandafløttinum og aftur til Statoil. Hesin teinurin ver›ur koyrdur tvær og eina hálva fer›. Byrja› ver›ur kl. 15.30, og súkklararnir koma á mál kl. 17.15.

| Plas. | RyggNr. | Navn | Eftirnavn | Felag | Tí› | Km/t |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 1 | Rógvi | Johansen | Cycling Aarhus | 0:03:45 | 41,6 |
| 2 | 6 | Jens | Tousgaard | FIX Rødovre | 0:03:46 | 41,42 |
| 3 | 4 | Simon | Borchmann | Hvidovre Atletik | 0:03:48 | 41,05 |
| 4 | 3 | Gunnar | Dahl-Olsen | Tórshavnar Súkklufelag | 0:03:52 | 40,34 |
| 5 | 5 | Janus | Jørgensen | Cycling Aarhus | 0:03:52 | 40,34 |
| 6 | 2 | Jørgen | Andersen | Cycling Aarhus | 0:03:54 | 40 |
| 7 | 7 | Kenneth | Gormsen | CC Gladsaxe | 0:03:55 | 39,83 |
| 8 | 8 | Jóhann | Brend | CC Gladsaxe | 0:03:58 | 39,33 |
| 9 | 24 | Remi | Lamhauge | Tórshavnar Súkklufelag | 0:04:00 | 39 |
| 10 | 10 | Sverri | Mohr Edvinsson | Tórshavnar Súkklufelag | 0:04:02 | 38,68 |
| 11 | 13 | Jákup | Johansen | Tórshavnar Súkklufelag | 0:04:03 | 38,52 |
| 12 | 14 | Jeppe | Thing | Cycling Aarhus | 0:04:03 | 38,52 |
| 13 | 9 | Kári | Brattaberg | Tórshavnar Súkklufelag | 0:04:05 | 38,2 |
| 14 | 12 | Tony | Ditlevsen | Roskilde Triathlon | 0:04:07 | 37,89 |
| 15 | 17 | Esmar | Joensen | Tórshavnar Súkklufelag | 0:04:09 | 37,59 |
| 16 | 19 | Christian | Guttesen | Tórshavnar Súkklufelag | 0:04:11 | 37,29 |
| 17 | 18 | Martin | Kortegaard | Odense Triathlon Klub | 0:04:14 | 36,85 |
| 18 | 22 | Evald | Rasmussen | Tórshavnar Súkklufelag | 0:04:15 | 36,71 |
| 19 | 11 | Jørgen | Nielsen | Politiets Cykelclub | 0:04:15 | 36,71 |
| 20 | 23 | Kári | Simonsen | Tórshavnar Súkklufelag | 0:04:19 | 36,14 |
| 21 | 26 | Jens Sigurd | Simonsen | Tórshavnar Súkklufelag | 0:04:21 | 35,86 |
| 22 | 15 | Ey›un | Poulsen | Tórshavnar Súkklufelag | 0:04:23 | 35,59 |
| 23 | 16 | Birthe | Dabelstein | Cycling Aarhus | 0:04:24 | 35,45 |
| 24 | 21 | Eli | Christiansen | Tórshavnar Súkklufelag | 0:04:33 | 34,29 |
| 25 | 27 | Eirikur | Olsen | Tórshavnar Súkklufelag | 0:04:42 | 33,19 |
| 26 | 25 | Bár›ur | Huusgaard | Tórshavnar Súkklufelag | 0:04:58 | 31,41 |
| 27 | 28 | Geyr | Gilsteinsson | Tórshavnar Súkklufelag | 0:05:01 | 31,1 |
| 28 | 29 | Ann | Zachariassen | Tórshavnar Súkklufelag | 0:05:11 | 30,1 |